

*G.g. Hetta heftið er ikki liðugt, men ein fyribilsútgáva!*

# Útbúgving og førleikamenning

Næmingabókin, síða 74-81

Førleikar:

- At fremja samfelagsfrøðiligar kanningar, bæði av kvalitativum og kvantitativum slagi. At skilja, nær teir ymisku kanningarhættirnir eru hóskandi at brúka.
- At leggja fram faklig úrslit munnliga. At brúka ymiskar framløguhættir, m.a. eisini at brúka KT at stuðla framløgur við.
- At eygleiða einfaldar samfelagsligar samanhangir í nærumhvørvinum. At gera kanningararbeiði úti í samfelagnum, har smærri einfaldar samrøður ella spurnakanningar verða nýttar.
- At leita sær týðandi og álítandi vitan, bæði gjøgnum internetið og fysiskar miðlar. At nýta grundleggjandi keldukritikk.

Skipa flokkin í bólkar. Í bólkinum skal vera formaður, skrivari og aðrir limir. Hvør bólkur fær ábyrgd av at kanna hvør sítt arbeiðspláss í lokaløkinum (antin privat ella alment). Hvør bólkur orðar spurningar til samrøður. Formaðurin spyr og skrivarin skrivar svarini niður.

Her eru tvey uppskot til spurningar. Leggið fleiri afturat eftir tørvi:

- Hvørjar førleikar skal man hava fyri at arbeiða á hesum arbeiðsplássinum?
- Hvør útbúgving kann geva førleikar til at arbeiða á hesum arbeiðsplássinum?
- O.s.fr.

Tá næmingarnir hava gjørt kanningarnar, verða tær lagdar fram fyri flokkinum. Um tíð er til tess, ber til at seta tær upp í framløguforrit. Annars kunnu bólkarnir eisini leggja útfylta spurnaskjalið fram.